# Fiat Grande Punto er størri enn Punto

**Hóast ein heilt nýggjur Grande Punto er komin á marknaðin, verður núverandi Fiat Punto ikki tikin av skánni, men verður framvegis á marknaðinum. Grande Punto er ein tann størsti í sínum klassa**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Smáir bilar hava altíð verið tað, sum Fiat eru kendir fyri, og Punto hevur í fleiri ár verið ein tann mest seldi bilur í Evropa í sínum klassa.

Eftir at hesin nýggi Grande Punto er komin á marknaðin, verður núverandi Fiat Punto ikki tikin av skánni men verður framvegis á marknaðinum. Hann er bíligari enn tann nýggi og skal eftir ætlan hjálpa til í kappingini við bíligu koreansku bilarnar, sum taka alt meira av evropeiska bilmarknaðinum.

Við sínum 403 cm er Grande Punto heilar 20 cm longri enn núverandi Punto, og aksilfrástøðan er økt við 5 cm. Hetta ger, at Grande Punto er ein tann størsti bilurin í sínum klassa. Hann verður gjørdur við bæði trimum og fimm hurðum. Kabinan er flott og rúmlig, og bilurin er góður og lættur at koyra við, bæði til býkoyring og til longri túrar. Elektriska servstýringin er sera løtt at handfara og stútt, eisini tá ferðin er nógv.

Bildesignarin Giorgetto Guigiaro frá Ital Design hevur teknað bilin, sum líkist italska luksus sportbilinum Maserati framman, ið hann eisini hevur teknað.

Grande Punto fæst við tveimum bensin og tveimum dieselmotorum: 1,2 litur bensin við 65 hk, og 1,4 litur bensin við 77 hk, 1,3 JTD Multijet diesel við 75 hk, og 1,9 JTD Multijet við 130 hk. Bilurin fæst í útgávunum: Active, Dynamic og Sport.

Bilurin fekk fimm stjørnur og fult stigatal, tá hann varð trygdartestaður hjá EuroNCAP. Hann er væl útgjørdur við nógvari trygdarútgerð sum standard.

Grande Punto kann síggjast og roynast hjá Nordcar. Bíligasta útgávan: 1,2 Active við trimum hurðum kostar 139.000 krónur.



*Bildesignarin Giorgetto Guigiaro hevur teknað bilin, sum líkist italska luksus sportbilinum Maserati framman*



*Fiat Grande Punto verður gjørdur við bæði trimum og fimm hurðum og er ein tann størsti í sínum klassa*


*Kabinan er flott og rúmlig, og bilurin er góður og lættur at koyra við, bæði til býkoyring og til longri túrar*

## FAKTA

Fiat Grande Punto 1,4 Active 5/h

| | |
|---|---|
| Motorurin | 1,4 litur bensin 77 hk |
| 0-100 km/t | 13,2 sek |
| Bensinnýtsla | 16,4 km/l (blandað koyring) |
| Dekkstødd | 175/65-15 |
| Stødd og vekt | |
| Longd | 403,0 cm |
| Breidd | 168,7 cm |
| Hædd | 149,0 cm |
| Eginvekt | 1.060 kg |
| Viðførisrúm | 275 litrar |
| Prísur | kr. 166.000,- |
| Søluumboð | Sp/f Nordcar<br>Smiðjugerði 4<br>FO-100 Tórshavn<br>Tel. 308080 |

· Umvæling av tryggingarskaðum og privat skaðum
· Vit umvæla øll bilmerki
· Klárgering til sýn
· Bremsur, útstoyt, stoytdoyvarar, rustarbeiði o.m.a.



Ring og fá eitt tilboð

**Sp/f Plátuverkstaðið**
Falkavegur · Tórshavn · Tel 321778 ella 221778
Teldupostur: plv@plv.fo